## Ungpolitiskt samstarv

**Hósdagin, 23. septembur 2004, tóku politisku ungmannafeløgini stig til at stova samtakið PolUng**

SAMSTARV
*Tíðindaskriv*

Endamálið er at savna politisku ungmannafeløgini um felags áhugamál teirra. PolUNg er stovnað fyri skapa kjak og skipa fyri tiltøkum, sum elva til kjak - serliga millum ungdómar.

**Stovnandi feløgini eru hesi:**
- Ung fyri Miðflokkin,
- Unga Tjóðveldið,
- Unga Sjálvstýrið,
- Sosialistiskt Ungmannafelag,
- Ungmannafelagið Samband
- HUXA (Fólkafloksungdómur)

Ungmannafeløgini hava fyrr verið saman um tiltøk, nevnast kunnu millum onnur TABU-ráðstevnan og Nýtt Hugfar. Samstarvið hevur lagt lunnar undir stovningina av PolUng. Samtakið er samstundis eitt forum fyri politisku ungmannafeløgini.

Á fyrsta fundi PolUngs skipaði nevndin seg soleiðis:
*Forkvinna:* Turid Christophersen, HUXA (Fólkafloksungdómur)
*Næstformaður:* Dan Lamhauge, Unga Sjálvstýrið
*Kassameistari:* Jógvan Jacobsen, Unga Tjóðveldið
*Skrivari:* Eyðna Vidtfeldt, Ungmannafelagið Samband
*Nevndarlimur:* Elin Tausen, Ung fyri Miðflokkin
*Nevndarlimur:* Annika Eidesgaard, Sosialistiskt Ungmannafelag

PolUng fer í næstum at skipa fyri kjakelvandi tiltøkum.

# Tekur fleiri mánaðir at gera nýggja Smyril lidnan



*Nú í langa tíð hevur arbeiðið upp á nýggja Smyril fyri at mesta ligið stilt. Men frá tí at arbeiðið verður tikið uppaftur av álvara, tekur tað fýra, fimm mánaðir at gera skipið liðugt*

**Gongst illa, verður nýggi Smyril ikki liðugur fyrrenn seint í vár ella í summar**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað verður ikki enn á sinni, at nýggi Smyril verður liðugur.

Tað staðfestir tekniski leiðarin á Strandferðsluni, Magnus Magnussen, sum hevur eftirlit við arbeiðnum at gera nýggja Smyril.

Orsøkin er, at tað er ruðuleiki á Skipasmiðjunum hjá IZAR, sum byggir nýggja Smyril. Tað merkir, at arbeiðið verður lagt lamið í heilum.

Áðrenn hesin ruðulleikin tók seg upp, var nýggi Smyril longu seinkaður. Men arbeiðssteðgirnir, sum nú eru, gera bara ilt verri.

Og Magnus Magnussen sigur, at sum støðan er nú, er vónleyst at siga, nær nýggi Smyril verður liðugur.

Men hann sigur, at frá tí at arbeiðið verður tikið uppaftur av álvara, fer tað at taka einar fýra fimm mánaðir at gera hann lidnan.

### Afturvendandi arbeiðssteðgir

Sostatt er ikki væntandi, at tað verður fyrrenn nakað væl er farið av næsta árið, at flaggskipið hjá Strandferðsluni verður at síggja ímillum oyggjarnar.

Magnus Magnussen sigur, at arbeiðið uppá nýggja Smyril hevur verið merkt av verkføllum og arbeiðssteðgum nú í langa tíð.

Tað er spanska skipasmiðjusamtakið, IZAR, sum byggir nýggja Smyril.

Í summar varð samtakið dømt at betala spanska landskassanum eina ovurhonds stóra upphædd aftur, sum tað skuldi havt fingið ólógliga í almennum stuðuli.

Fyrr var talan um eitt hernaðarligt samtak og eitt vanligt samtak, men fyri nøkrum árum síðani varð alt sligið saman til IZAR samtakið.

Samstundis varð varð hernaðarligt og vanligt virksemið blandað saman. Spanska stjórnin betalir sjálvsagt fyri hernaðarliga partin, men gjøgnumskygnið hevur verið ov lítið og ES er komið til ta niðurstøðu, at peningur frá sponsku stjørnini, sum skuldi brúkast til hernaðarliga partin, ístaðin er brúktur sum stuðul til tann vanliga partin av virkseminum og tað er ólógligt og tí varð IZAR dømt at betala stóra bót.

Alt hetta hevur ført til stórar rembingar á skipasmiðjunum.

IZAR hevur arbeitt við at loysa trupulleikum og tað hevur ligið í luftini, at onkrar skipasmiðjur skulu lata aftur, aðrar skulu einskiljast og í øðrum førum skal virksemið á ymsum pørtum í samtakinum skiljast sundur, so at tað hernaðarliga er fyri seg og tað vanliga fyri seg, fyri at fáa meiri gjøgnumskygni í.

Hetta hevur fingið arbeiðsfólkið at kenna seg ótrygt og tí hava tey sett tiltøk í verk ímóti skipasmiðjuni.

Hetta hevur ført við sær, at nú í langa tíð, hevur arbeiðið ligið stilt í heilum og tað hevur eisini rakt arbeiðið uppá nýggja Smyril.

Talan er fyri tað mesta um punktverkføll, har tað bara verður arbeitt nakrar fáar tímar. Onkuntíð verður aftur arbeitt heilar dagar, men so liggur alt aftur stilt í nakrar dagar.

Mikudagin arbeiddu teir allan dagin, men tað er einastu ferð í longri tíð, at arbeitt hevur verið ein heilan dag.

– Sostatt henda lítil og ongi framstig í byggingini. Teir dagarnar, har teir arbeiða allan dagin, kemur nakað burturúr, men táið teir bara arbeiða nakrar tímar, kemur onki burturúr, sigur Magnus Magnussen.

Hann leggur afturat, at fyrrenn viðurskiftini í IZAR eru fingin í rættlag, er heilt vónleyst at siga, nær nýggi Smyril verður liðugur.

Men hann metir, at frá tí at arbeiðið verður tikið uppaftur av álvara, fer tað at taka eina fýra fimm mánaðir at gera skipið liðugt.

Men nær arbeiðið verður tikið uppaftur, er vónleyst at siga í løtuni.

– Sostatt er støðan onki serlig í løtuni og gongurheilt illa, verður nýggi Smyril ikki liðugur fyrrenn seint í vár, ella í summar.

### Kunnu onki gera

Magnus Magnussen sigur, at Strandferðslan hevur sáttmála við IZAR og sotatt er tað onki, sum kann gerast við støðuna.

IZAR hevur váttað fyri Strandferðsluni, at sáttmálin verður hildin.

Men í sáttmálanum er eisini gjørt rúm fyri seinkingum og Strandferðslan kann ikki vera leys av sáttmálanum fyrrenn seint í summar.

– Tá kunnu vit siga okkum leys av sáttmálanum og siga, at vit vilja ikki hava skipið. Men tað er neyvan gongda leiðin.

So leingi sáttmálin gongur, ber heldur ikki til hjá Strandferðsluni at áleggja IZAR at sleipa Smyril onkra aðrastaðni at verða gjørdur liðugur.

– Tað eru vit ikki harrar yvir. So leingi sáttmálin gongur, er tað IZAR, sum hevur myndugleikan yvir byggingini. Okkara einasta uppgáva er at tryggja, at dygdin í tí, sum gjørt verður, er ílagi.

Kortini stendur eisini í sáttmálanum, at IZAR kemur undir dagbøtur frá 1. desember. Bøturnar eru slakar 100.000 krónur um dagin í fyrstuni, men so hækka tær.

– Skipanin við dagbótum gongur yvir átta mánaðir. Er skipið ikki liðugt tá, er talan um sáttmálabrot og so er ein nýggj støða, sum støða má takast til tá, sigur Magnus Magnussen.



# Breyt nasahjólið undir lending í Vágum

**Eitt flogfar hjá íslendsku sjóverjuni breyt nasahjáolið, tá tað lendi í Vágum fyrrapartin fríggjadagin. Eingin mansskaði hendi av óhappinum**

FLOGÓHAPP
*Edvard Joensen*



*Íslendska flogfarið stóð á vøllinum, meðan fólk frá SLV royndi at fáa tað gjørt klárt til at verða sleipað inn á støðuplássið*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:**
Alt spældi væl av, tá ein splitta í nasahjólinum á einum íslendskum flogfari brotnaði, tá flogfarið setti seg á flogvøllinum í Vágum fyrrapartin fríggjadagin. Flogvøllurin varð stongdur einar tveir tímar orsakað av óhappinum.

Eitt flogfar hjá íslendsku sjóverjuni kom fyrrapartin fríggjadagin í Vágar við fólki, sum skuldi á ein fund í Føroyum.

Undir lendingini í Vágum brotnaði ein splitta í nasahjólinum, og flogfarið varð standandi úti á vøllinum og slapp ongan veg.

Finnbogi Niclasen, flogvallarovasti, sigur, at eingin mansskaði hendi, og at ferðafólkini, sum vóru við flogfarinum, vóru fingin inn í terminalin og fóru víðari við bussi, sum var eftir teimum.

Flogfarið varð standandi einar tveir tímar ella so á vøllinum. Tað gjørdi so, at onnur ferðsla varð seinkað hesa tíðina. Bæði Atlantsflog og Maersk Air høvdu flogfør standandi, sum skuldu avstað, men máttu bíðað, til íslendska flogfarið var sleipað burtur av vøllinum.

Kanningarnevndir úr bæði Danmark og Íslandi skuldu koma i Vágar at kanna skaðan, sum væntandi skjótt varð umvældur, segði Finnbogi Niclasen.

Hann væntaði fyrrapartin fríggjadagin, at flogfarið helst kundi fara aftur til Íslands leygardagin.

# Tobbi máar grundarlagið undir flokkinum

**Persónligu álopini hjá Tórbjørn Jacobsen eru djúpt oyðileggjandi fyri Tjóðveldisflokkin. Formaður floksins, Høgni Hoydal, kennir seg ærumeiddan av álopunum frá skarpskjúttanum og skiparanum á Glyvrum**

ÓSEMJA Í TJÓÐVELDISFLOKKINUM
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



Lygnari. Ungmamma. Lítli messias. Pseudomessias hjá gjeikarum og lesbiskum føroyingum, ið er ílatin eitt politiskt kot. Tað er ikki hissini eyknevni, ið herja yvir floksformannin í Tjóðveldisflokkinum, Høgna Hoydal.

Skarpskjúttin á Glyvrum, Tórbjørn Jacobsen, gevst ikki so. Hann hevur seinastu dagarnar verið á Álandi, og Í lesarabrævi í Sosialinum í dag tekur hann aftur blaðið frá munninum.

Tjóðveldistingmaðurin úr Eysturoynni ætlar ikki at bakka ein tumma fyri floksformanninum, og heldur fast um, at Høgni Hoydal lýgur í samband við málið um skrásetta parlagið.

Tórbjørn Jacobsen hóttir eisini við, at verður hann álopin aftur, hevur hann nakrar politiskar handgranatir í skápinum, ið eru klárar at leypa út-skuldi tað verið neyðugt.

### Hunddálking

Høgni Hoydal hevur ikki lisið seinastu viðmerkingina hjá fyrrverandi næstformanninum í Tjóðveldisflokkinum, men tá blaðmaðurin reksar nøkur lýsingarorð upp, gerst formaðurin í Tjóðveldisflokkinum skakkur

–Eg veit satt at siga ikki hvat eg skal siga, tí hatt er so langt úti. Síðan eg fór í politikk hevur verið gerandiskostur, at eg havi verið hunddálkaður av mínum politiskum mótstøðumonnum, ja so nógv, at eg kundi havt eini 40 sakir um ærumeiðing, um tað skuldi verið. Men tá tað er ein limur í egnum flokki, ið leggur eftir einum, tá tosa vit um ein trupulleika á heilt øðrum stigi, sigur Høgni Hoydal

Formaðurin í flokkinum sigur, at ákærurnar hjá Tórbjørn Jacobsen eru djúpt oyðileggjandi fyri flokkin og elva til eina stóra ørkymlan innanhýsis í flokkinum.

– Tað er í grundini líkamikið, hvat hann heldur um mín persón, men hann skaðar flokkin almikið við slíkum álopum, vísir Høgni Hoydal á.

Spurdur, um álopini frá Tórbjørn Jacobsen standa í mát við tey persónligu álop, sum hann metir grundarlag var fyri sakum um ærumeiðing, svarar Høgni, at sjálvandi gera tey tað, tí talan er um beinleiðis útspilling.

### Tosa ikki saman

Høgni Hoydal greiðir frá, at hann og Tórbjørn Jacobsen hava ikki tosað saman um málið enn. Floksformaður hevur fleiri ferðir roynt at fingið fatur á Tórbirni á telefon, men tað hevur ikki eydnast enn.

– Vit hava bara gjørt avtalu um at vit skulu tosa saman, men tað hava vit so ikki gjørt enn, tí eg havi ikki fingið fatur á honum, sigur hann

### Avleiðingar

Formaður Tjóðveldisfloksins slær enn einaferð fæst, at hann hevur ikki stórvegis hug at viðgera ósemjuna millum seg og Tórbjørn Jacobsen í fjølmiðlunum.

Spurdur, hvørji politisk stig flokkurin fer at taka í málinum, svarar Høgni Hoydal, at tað er greitt, at flokkurin kann ikki liva við hesum, men hann ynskir ikki, at fara á sama stig sum Tórbjørn og viðgera málið í fjølmiðlunum. Høgni Hoydal heldur fast um, at ósemjan skal viðgerast innanhýsis í Tjóðveldisflokkinum.

Spurdur, hvørja áskoðan hini tingfólkini í flokkinum hava til ósemjuna, svarar floksformaðurin, at tað er blaðmaðurin sjálvur noyddur at spyrja tey um.

*Verður Tórbjørn Jacobsen partur av tingmanningini hjá Tjóðveldisflokkinum um 14 dagar?*

Tað veit eg ikki. Tað, sum eg ætli siga í málinum, ætli eg mær fyrst at siga við Tórbjørn sjálvan og ikki við fjølmiðlarnar.

# Skrivaði upp á nakkan á Tobba

**Tórbjørn Jacobsen skuldsetir Høgni Hoydal fyri at hava sent út eitt tíðindaskriv upp á nakkan á sær, sum alment hongdi Tórbjørn Jacobsen út sum lygnara**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tann 22. november 2000 var Tórbjørn Jacobsen í Degi og Viku alment hongdur út fyri at lúgva. Hann segði, at hann ongantíð hevði kallað Anfinn Kallsberg, løgmann, fyri »danskan leigusvein«, so sum hann var endurgivin fyri at siga í Sosialinum hendan dagin.

Men tá sjónvarpið spældi bandið, har Tórbjørn Jacobsen segði tey síðani so víðagitnu orðini, fekk pípan annað ljóð.

Tórbjørn Jacobsen, táverandi mentamálaráðharri, hevði tá gjørt av, at grundlógardagurin 5. juni ikki longur skuldi vera frídagur í skúlunum, men í staðin altjóða arbeiðaradagurin 1. mai. Hetta dámdi ikki løgmanni, tí kravdi hann av Tórbjørni Jacobsen, at hann broytti avgerðina aftur. Hetta var orsøkin til glefsið mótvegis løgmanni hendan dagin.

Eftir at Sosialurin var komin á gøtuna, sendi Tórbjørn Jacobsen út eitt tíðindaskriv, har hann avsannaði tíðindini í Sosialinum. Hann segði tíðindaskrivinum m. a.:

»Undirritaði hevur ongantíð brúkt hatta orðið (danskur leigusveinur, red) um løgmann og kundi eiheldur nakrantíð funnið upp á tað…«

Í drúgvari grein í blaðnum í dag, har Tórbjørn Jacobsen viðger stríðið millum seg og Høgna Hoydal, vísir hann m. a. til hetta tíðindaskrivið og sigur:

»Tann lygnin var nú eitt produkt av einum tíðindaskrivi, sum lítli messias (Høgni Hoydal, red.) saman við onkrum øðrum, eftir sjálvsagdum kravi frá Anfinni Kalsberg, sendi fjølmiðlunum upp á nakkan á undirritaða, kommunuvalkvøldið í 2000.«

Sostatt gevur Tórbjørn Jacobsen Høgna Hoydal skuldi fyri ta lygnina, sum var ein av orsøkunum til, at Tórbjørn Jacobsen seinni mátti leggja frá sær sum landsstýrismaður.